Ernest Azzopardi av Malta:

# Vit skulu nýta støddina til egnan fyrimun



*Ernest Azzopardi av Malta heldur, at føroyingar áttu at lagt seg eftir at fáa eitt meira fjølbroytt vinnulív. Hann vísir á átøkini hjá Malta, sum hava lokkað útlendskar fyritøkur til landi í stórum tali*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Lítla miðjalhavsoyggin Malta er vorðið eitt mekka hjá útlendskum investorum, sum flokkast til landið. Hetta er úrslit av eini miðvísari ætlan hjá teimum stýrandi, og úrslitið er, at vinnulívið gerst meira fjølbroytt enn áður, tá ferðavinnan var tað einasta, sum landsins íbúgvar dúvaðu uppá**

VINNULÍV
*Stefan í Skorini*

– Smáir oyggjabólkar sum Føroyar og Malta nýta ofta støddina sum umbering fyri brek og vánaligar umstøður í samfelagnum. Vit geva støddini skyldina fyri alt. Hetta er tann serligi oyggjamentaliteturin, sum mangan leggur fót fyri framburði, sigur Ernest Azzopardi av Malta, sum í hesum døgum er í Føroyum og vitjar.

Ernest Azzopardi er leiðari av búskapardeildini á University of Malta. Harumframt er hann stjóri á kanningarstovuni fyri vatntøknifrøði og stjóri fyri vatnveitingini á Malta, sum er ein almenn fyritøka. Hann er í hesum døgum í Føroyum og kunnar um ymisk viðurskifti á Malta og leiklutin hjá smátjóðum í einum globalum búskapi.

Hann er sannførdur um, at man eisini kann nýta støddina til egnan fyrimun við at gagnnýta tað menniskjaliga tilfeingið betur. Malta er á stødd við Eysturoynna, og har búgva tilsamans 400.000 fólk á trimum oyggjum.

– Malta hevur einki náttúrligt tilfeingi, og tí hava vit verið noydd til at gagnnýta tað menniskjaliga, sum er arbeiðsmegin, ístaðin. Og tað at vit hava ein sera væl útbúna arbeiðsmegi er okkara størsta tilfeingi, sigur hann.

### Útlendskur kapitalur er lykilin

Fyri at fáa útlendskan pening til landið, hevur stjórnin fyri stuttum sett í verk ein nýggjan skatttapolitikk, sum gevur nýstovnaðum fyritøkum stórar fyrimunir. Hetta átakið, sum nevnist Business Promotion Act, lokkar fyritøkur at gera íløgur í landinum.

Í stuttum hevur landið sett inntøkuskattin munandi niður, soleiðis at nýggjar fyritøkur bert gjalda 5 prosent íinntøkuskatti sjey tey fyrstu árini. Síðani fer tað upp á 10 prosent næstu seks árini, og at enda fer tað upp á 15 prosent seinastu fimm árini í hesum tíðarskeiðnum.

Hetta gevur fyritøkunum eina blíða byrjan, so at tær hava lættari við at fóta sær tey fyrstu árini, sum mangan eru torfør hjá nýggjum fyritøkum.

Eisini leggur landið seg eftir at veita bíligar verksmiðjubygningar og bílig lán, og hetta eggjar fólki at fara undir ídnað og framleiðslu av ymsum slag.

Av tí sama hevur Malta tey seinastu árini upplivað, at alt fleiri altjóða fyritøkur velja at flyta sína framleiðslu til landið, og tær leggja pening eftir seg og geva íbúgvunum arbeiði.

– Hendan verkætlanin hevur til endamáls at lokka útlendingar at gera íløgur í okkara landi. Hetta hevur stóra ávirkan á vinnulívið, sum gerst nógv meira fjølbroytt enn áður, sigur Ernest.

Hann leggur dent á, at fyri lítil lond sum Føroyar og Malta er tað umráðandi at hava fjølbroytt vinnulív. Ein stórur veikleiki hjá Føroyum er, at vit einans hava fiskivinnuna at dúva uppá. Á Malta var ferðavinnan nógv tann størsta vinnan, men nú eru verða aðrir vinnuvegir eisini troyttir.

Malta leggur stóran dent á at hava eina væl útbúna og fjølbroytta arbeiðsmegi, sum vinnulívið kann njóta gott av. Tí fáa lesandi stuðul eins og í Norðanlondum, so at øll skulu hava møguleika at nema sær útbúgving. Hetta hjálpir eisini fyritøkum við at koma í gongd.

### Bangin fyri framtíðini

Á eini fólkaatkvøðu gjørdi fólkið á Malta av at fara uppí ES. Meirilutin fyri ES-limaskapi var sera tepur. Ernest metir, at limaskapurin er ein fyrimunur fyri landið.

– Fyri tað fyrsta fáa vit við ES-limaskapinum betri marknaðaratgongd og harvið betri møguleikar at selja okkara vørur. Eisini verða vit vard ímóti árinum frá globaliseringini, sigur Ernest Azzopardi.

Hann skilir tó, at føroyingar altíð hava verið sera negativir yvirfyri ES. Hann heldur, at hetta ofta eyðkennir lítil samfeløg. Tey eru bangin fyri, at tann stóri fer at gloypa tí lítla, og at tann minni parturin onga ávirkan fær í felagsskapinum.

Eisini heldur hann, at oyggjabúgvar mangan eru bangnir fyri framtíðini, og spyrja seg sjálvar, hví tað er neyðugt at broyta tað verandi.

Hóast hann dugir at síggja nógvar fyrimunir við at vera ein lítil tjóð, eru eisini fleiri vansar, sum ein skal varða seg fyri. Eitt nú er eitt land sum Malta meira viðkvæmt fyri broytingum runt um í heiminum.

Eisini hava smærri lond lyndi til at leggja alla sína orku í eina serstaka vinnu - fiskivinnu í Føroyum og ferðavinnu á Malta. Tí er umráðandi at hava eitt fjølbroytt vinnulív, og Ernest Azzopardi heldur, at Malta hevur gjørt átøk, sum byrgja fyri slíkum trupulleikum.

# Team 85 stevnir Tjóðveldisflokkinum

**Lýsingarfyritøkan Team 85 og Tjóðveldisflokkurin eru ósamd um støddina á rokningini fyri valstríðið hjá flokkinum í fjør, og tí hevur fyritøkan stevnt**

ROKNING
*Stefan í Skorini*

Tjóðveldisflokkurin vil eftir øllum at døma ikki rinda tað, sum Team 85 krevur fyri at hava gjørt lýsingar fyri flokkin uppundir løgtingsvalið í fjør. Tí hevur fyritøkan stevnt flokkinum fyri at fáa teir kravdu pengarnar. Sambært rættarlistanum var fyrireikandi rættarfundur týsmorgunin.

Málið snýr seg um eina nógv umstrídda lýsing. Stór gøla stóðst av hesi lýsing hjá Tjóðveldisflokkinum, sum stóð í Sosialinum stutt fyri valið. Flokkurin vildi ikki kennast við innihaldið í hesi lýsingini, og Team 85 átók sær ábyrgdina av hesum mistaki.

Lýsingin vísti helvtina av andlitinum á Lisbeth L. Petersen setta saman við helvtini av andlitinum hjá Anders Fogh Rasmussen, og áskriftin var hálvdanskt. Eisini var helvtin av andlitinum hjá Jóannesi Eidesgaard sett saman við Poul Nyrup Rasmussen, og hendan samansetingin varð kallað hálvføroysk. Síðani varð andlitsmynd av Høgna Hoydal, og hetta varð kallað "føroyskt".

Tjóðveldisflokkurin heldur, at virðið av øllum teirra valstríði minkaði munandi av hesi lýsingini, hvørs innihald flokkurin ikki vil kennast við. Ósemjan snýr seg sostatt um samlaðu rokningina fyri valstríðið.

Hvørki Johnny Gaard, stjóri á Team 85, ella Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, vilja gera viðmerkingar til málið. Heldur ikki bar til at fáa upplýst, hvussu nógvur peningur liggur í buktini.

Væntandi er tó, at partarnir koma til eina semju, og at Føroya Rættur ikki skal avgera hesa trætuna millum partarnar.Málið er útsett fleiri ferðir áður, og partarnir hava roynt at funnið eina semju.



# Barnaprixið nærum fullteknað

**Aftur í ár fara Mark Joensen og James Olsen at skipa fyri Nósabarnaprixi, og longu nú eru tær flestu kappingarnar fullteknaðar. Fleiri av undanumførunum vera á stevnum kring landið, og hetta fer møguliga at vekja enn meira ans fyri hesi serstøku sangkapping**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*



*Mark Joensen og James Olsen fara aftur í ár at skipa fyri sangkapping fyri børn, nevnd nósabarnaprixið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

2. árið á rað verður skipað fyri nósabarnaprixi, og aftur í ár er áhugin ómetaliga stórur. Tey flestu umførini eru nevniliga fullteknað.

– Tað er avgjørt brúk fyri eini slíkari kapping fyri tey, sum eru yngri enn fimtan ár, tí eingin kapping hevur verið fyri børn fyrr, sigur ein av fyrireikarunum James Olsen.

Í fjør var prixið um heystið, men í ár verður tiltakið um summarið, og fleiri av umførunum vera á stevnum, og finalan verður á ólavsøku.

– Tað eru ikki serliga nógv tiltøk fyri børn á stevnunum sum heild, og tí eru útlit fyri, at vit kunnu fáa enn fleiri áskoðarar til tiltøkini, sigur Mark Joensen, sum aftur í ár er við til at skipa fyri sangkappingini.

### Lutakast um luttakarar

Tá fleiri tekna seg, enn pláss er fyri, mugu fyrireikararnir gera av, hvør sleppur við, og hvør verður við sviðusoð. Hetta verður gjørt við lutakasti, og fyrireikararnir ásanna, at onkrir góðir sangarar kunnu detta burturímillum á hendan hátt.

Slagið av sangum spennir víða. Fleiri velja at syngja kendar sunnudagsskúlasangir, meðan onnur syngja vanligar barnasangir. Øll í aldrinum 7 til 14 ár kunnu luttaka.

Mark og James seta seg eisini í samband við foreldrini fyri at kanna, um tilmeldingin er í lagi, so at sleppast kann undan, at foreldur ella børn hava boðað frá luttøku í óðum verkum.

– Vit vóru snøgt sagt tiknir á bóli síðsta ár, sigur Mark, tá tosað verður um støðið á kappingini í fjør.

– Tey flestu børnini duga ómetaliga væl at syngja, og við hesum tiltakinum sleppa tey at vísa, hvat tey duga. Nógv verður gjørt við sang í skúlum og samkomum kring landið, og hetta ger, at kappingin er sera jøvn, sigur James Olsen.

### Fløguútgáva

Til finaluna, sum verður 28. juli, verður møguleiki at keypa eina fløgu við tólv løgum. Allir finalistarnir fáa eitt lag á fløguna, og tað er ein gularót, sum allir luttakararnir kunnu elta. Upptøkurnar verða gjørdar, tá undanumførini eru fingin frá hondini. James Olsen letur ikki illa at søluni av fløguni, sum varð givin út í fjør.

Vinnarin verður 10.000 krónur ríkari, meðan nummar tvey og trý fáa smærri peningagávur, men enn er ikki heilt greitt, hvussu stórir hesir vinningarnir vera.

Tilsamans sleppa 60 luttakarar við til tey seks undanumførini, og tað vera so tíggju sangarar við í hvørjum umfari. Ein sleppur víðari úr hvørjum umfari, men í Havn sleppa tvey víðari til finaluna.

Meðan tiltøkini ætla fyrireikararnir at hava ymisk stuttlig happenings fyri børnini. Ætlanin er at hava klovnar og gestatónleikarar fyri at gera tiltakið meira fjølbroytt. Aftur í ár er Føroya Banki høvuðsstuðul fyri tiltakinum. Meira kann lesast um nósabarnaprixið á www.barnaprix.fo.

## Nær og hvar

| | |
|---|---|
| 7. juni | í Roynhøllini í Hvalba |
| 14. juni | í KÍ-høllini í Klaksvík |
| 21. juni | í teltinum í Kollafirði (Sundalagsstevna) |
| 28. juni | í badmintonhøllini í Havn |
| 5. juli | í Mentanarhúsinum í Fuglafirði (Varmakeldustevna) |
| 12. juli | í bygdarhúsinum í Miðvági (Vestanstevna) |
| 28. juli | finalan í badmintonhøllini í Havn |

Øll tiltøkini eru frá kl. 19 til 21.

# Eldur í KÍ-høllini

**Stutt fyri midnátt mánakvøldið varð boðað frá eldsbruna í KÍ-høllini. Fólk var í høllini um hetta mundið, og sløkkiliðið var tí skjótt á staðnum**

ELDSBRUNI
*Stefan í Skorini*




Eldurin kyknaði í einum ventilatiónsrúmi í sunnara enda á høllini. Fólk fundaðist í norðara enda, og umsjónarmaðurin var eisini til staðar. Tí varnaðust fólk eldin ógvuliga skjótt, og boð vórðu send eftir sløkkiliðnum beinanvegin.

Kári Kjelnæs frá sløkkiliðnum sigur, at fyrstu sløkkiliðsmenninir vóru á staðnum, tveir minuttir eftir at teir fingu boðini. Teir fingu tamarhald á eldinum rættiliga skjótt.

Tá hevði umsjónarmaðurin longu verið inni í rúminum við einum pulvursløkkjara, og hetta basti eldinum nakað.

Løgreglan veit enn ikki at siga við vissu, hvussu eldurin kyknaði. Umframt at hýsa ventilatiónsskipanini, verður rúmið eisini nýtt sum goymslurúm av eitt nú gloymdum klæðum, og eldur hevur verið í klæðnadunganum. Løgreglan sigur eisini, at umsjónarmaðurin hevði verið inni í rúminum stutt frammanundan, men hann dugdi ikki at geva nakra frágreiðing um eldsbrunan.

Nakað av skaða stóðst av eldinum, og høllin var fylt við royki. Helst verður høllin stongd í nakrar dagar, meðan ruddað verður upp, og umvælingar verða gjørdar.

# Gevist at roykja við Mette Fønss

**Vil tú sleppa av við roykingina skjótt og lætt so er danski terapeuturin Mette Fønss kanska svarið. Hon kemur nú til Føroya og fer at halda skeið fyri fólki, sum vilja gevast við at roykja.**

TÍÐINDASKRIV

Først holdt Barbara op, så sagde Katrin stop, derefter gjorde Andrias det for sidste gang! Nu giver de andre Færinger mulighed for at gøre summen af laster mindre.

Barbara, Katrin og Andrias er alle blevet røgfri 'the Easyway' hos den danske rygestopterapeaut Mette Fønss.

'De fleste rygere ville gerne holde op, men er bange for at det bliver svært. De ville til gengæld allesammen ønske at de aldrig var startet. Men hvad nu hvis det var nemt at holde op?' spørger Mette Fønss, som repræsenterer Allen Carrs The Easyway to Stop Smoking i Danmark, en ny og banebrydende metode til rygestop.

Uden brug af viljestyrke, skræmmekampagne, nåle eller nikotinerstatning afvænner Mette Fønss stor- og smårygere på et fem timers kursus. Vel og mærke uden at de efterfølgende tager på i vægt eller føler at de lever et liv i afsavn. Hun er så sikker på sin succes, at folk får pengene retur hvis det ikke lykkes dem at holde op. På baggrund af denne pengene-tilbage-garanti, bliver over 90 % røgfri.

Katrin í Gongini fra SMS, Maria Smith fra Hotel Føroyar og Andrias Jacobsen fra Shell går nu i spidsen for at gøre Færingerne til 'glade ikkerygere' og har derfor inviteret Mette Fønss til Thorshavn fra d.12. til d. 21 maj, hvor hun afholder rygestopkurser for medarbejderne fra SMS, Hotel Føroyar, Shell og Atlantic Airways.

Man behøver dog ikke at være ansat i førnævnte firmaer for at få mulighed for at blive røgfri 'the Easyway'. Torsdag d. 15. maj afholder Mette Fønss rygestopkursus for alle interesserede kl. 15.00 på Hotel Føroyar, Við Oyggjavegin, Thorshavn.

Tilmeldning kan ske på tlf. 0045 5190 3536 eller www.easyway.dk

Mette Fønss er på en mission og har en vision! Ring hvis I ønsker at høre nærmere om hvordan og hvorfor.